

www.oljan.fo

**Jan Müller** 23 - 10 - 2012

# Norska oljuvinnan tað hægsta lønarlagið

Tey, sum arbeiða í teirri norsku frálandavinnuni, tjena nú meiri enn eina millión krónur í meðal um árið ella tvær ferðir meiri enn meðallønina í oljuvinnuni aðrastaðni í heiminum. Tað stendur í blaðnum Dagens Næringsliv, sum hevur hugt í frágreiðingina "The Oil and Gas Global Salery 2012", sum fyritøkan Hays Oil & Gas gevur út. Hays Oil & Gas arbeiðir við at útvega fólk til oljuídnaðin kring heimin. Tey, sum hava skrivað frágreiðingina, siga, at nógv av teimum, sum arbeiða í norsku oljuuvinnuni, tjena helst væl meiri enn eina millión norskar krónur um árið. Í sama viðfangi gera tey vart við, at tað eru ov fáir verkfrøðingar í Noregi. -Vit mugu minnast til, at hetta er meðallønin, og at tað tí eru mong, sum arbeiða í Noregi, sum tjena munandi meiri. Serliga subsea-verkfrøðingar, sum eru nógv eftirspurrdir, tjena munandi meiri, sigur Duncan Freer, sum er stjóri í Oil and Gas Job Search, ið hevur skrivað frágreiðingina saman við Heys Oil & Gas. Meiri løn í 2012 Í frágreiðingini sæst, at triði hvør, sum arbeiðir í norsku oljuvinnuni, væntar, at lønin fer at hækka 10 prosent afturat í ár. Stjórin í North Energy, Erik Karlstrøm, sigur við Dagens Næringsliv, at orsøkin til ta høgu lønina er, at tað eru alt ov fá, ið útbúgva seg inan verkfrøði. -Norðmenn vilja ikki lesa verkfrøði ella arbeiða sum verkfrøðingar, og so er tað einki løgið í, at fyritøkur mugu rinda ta løn, sum tær noyðast at rinda, sigur Erik Karlstrøm. Sjálvur fekk hann sambært Dagens Næringsliv 8,4 milliónir krónur í løn og samsýningum í 2010. 60.600 kr. um mánaðin Tøl hjá norsku hagstovuni vísa, at tann 1. oktober í 2011 høvdu fólk, sum arbeiddu fulla tíð í olju- ella gassídnaðinum, eina meðal mánaðarløn upp á 60.600 krónur - og tá var eyka fyri møguliga yvirtíð ikki talt við. Í hesum lønarflokkinum vóru eitt nú operatørar, bilførarar, pallarbeiðsfólk, teknikarar og maskinfólk ella tilsamans 40.000 fólk. Samanborið við teirra starvsbrøður í øðrum oljulondum so sum Brunai, USA, Kanada og Saudiarabia fáa tey í

norsku oljuvinnuni ta bestu lønina, skrivar Dagens Næringsliv. Í hesum viðfangi kann nevnast, at tey í Saudiarabia eru tey lægst løntu.